# Stýrislimur kennir seg villleiddan

**– Høvdu vit vitað, at Karsten Hansen ikki fór at góðkenna sáttmálan, høvdu vit neyvan givið formanninum heimild at skriva undir, sigur Dia Poulsen úr Vági, sum er stýrislimur fyri Suðuroynna í SEV**

SEV
*Stefan í Skorini*

Stýrislimirnir í SEV vóru ikki kunnaðir um, at Karsten Hansen ikki fór at góðkenna sáttmálan millum SEV og Maskinmeistarafelagið, tá stýrið gav stýrisformanninum, Poul Arna Jacobsen, heimild at skriva undir, hóast leiðslan í SEV hevði fingið hesi boðini dagin fyri. Stýrislimirnir góvu sostatt formanninum heimild á skriva undir sáttmálan á skeivum grundarlagi.

Hetta vil Dia Poulsen, limur í stýrinum hjá SEV, vera við.

Á stýrisfundi tann 28. mars góvu teir seks stýrislimirnir formanninum heimild at skriva undir sáttmálan, sum SEV og Maskinmeistarafelagið settu sínar undirskriftir á sama dag.

Á fundi tann 27. mars fekk leiðslan í SEV munnlig boð frá Karsten Hansen, landsstýrismanni við fíggjarmálum, um, at hann ikki fór at góðkenna sáttmálan, sum gav maskinmeistarum eina lønarhækkan uppá góð 10 prosent.

Hetta fingu stýrislimirnir hjá SEV tó ikki at vita, tá stýrið varð savnað á fundi dagin eftir sambært Dia Poulsen.

Hann dugir ikki at siga, hví stýrislimirnir ikki fingu greið boð um hetta frá leiðsluni, men hann er ikki í iva um, at hetta er kleyvarskapur frá leiðslunnar síðu.

Enn hevur hann ikki fingið nakra frágreiðing um gongdina í málinum viðvíkjandi hesum.

Sosialurin royndi mánamorgunin at fáa orðið á stýrisformannin Poul Arna Jacobsen og Klæminti Weihe, stjóra í SEV, at gera viðmerkingar til málið, men til fánýtis.

### Mótsigandi upplýsingar

Ein annar stýrislimur er tó ikki samdur við Dia Poulsen. Kristian Fríðrik Olsen, stýrislimur fyri Norðoyggjar, sigur, at stýrið fekk nøktandi upplýsingar, tá tað gav stýrisformanninum heimild at skriva undir við Maskinmeistarafelagið.

Hann kennir seg sostatt ikki villleiddan á nakran hátt, sum Dia Poulsen hinvegin ger.

Tað eru sostatt mótsigandi upplýsingar, sum koma frá hesum báðum stýrislimunum hjá SEV viðvíkjandi fundinum tann 28. mars, tá formaðurin fekk heimild at skriva undir.

### SEV svaraði í dag

Hesin sáttmálin hevur elvt til mikið stríð, nú SEV hevur valt at leggja hendan nýggja sáttmálan til síðis og er farið at rinda lønir eftir tí gamla sáttmálanum.

Maskinmeistarafelagið sendi fríggjadagin eitt hvassorðað skriv til SEV og kravdi, at lønir aftur verða fluttar eftir nýggja sáttmálanum.

Mánadagin á middegi fekk Maskinmeistarafelagið svar frá SEV, men tá blaðið fór til prentingar var ikki greitt, hvat stendur í hesum svari.

# Tómt hús á Tórsvølli



**Innbúgvið til FSF bygningin á Tórsvølli varð sent aftur við Norrønu, og tískil standa húsini gapandi tóm til dystin móti Týsklandi inntil**

VERKFALL
*Heri á Rógvi*

Innbúgvið til húsini hjá FSF á Tórsvølli skuldi koma til landið við Norrønu mánadagin, men tað eydnaðist ikki at fáa hetta í land.

Einki endaligt undantaksloyvi var fingið til vega, men Fótbóltssambandið hevði vónir um at fáa innbúgvið í land, soleiðis at húsini kundu vera klár til dystin móti Týsklandi 11. juni.

Men innbúgvið varð sent umborð aftur á Norrønu, og tað verður í fyrsta lagi aftur í Føroyum mikudagin.

Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, sigur, at tað er ómetaliga umráðandi, at húsið nú verður funktiónelt.

– Húsið er heilt líðugt og klárt fylla innan við innbúgvi, sigur Ísak.

Hann heldur tað vera sera óheppið, um týskir leikarar, fjølmiðlar og týðandi fólk koma til eina tóma stovu, sum hann tekur til. Hetta kann gerast pínligt, heldur hann, tí nógv eygu eru vend móti Føroyum.

– Men vit blanda okkum ikki upp í verkfallið, sigur ein avgjørdur Ísak Mikladal.

Innbúgvið er til so at siga alt húsið, og tað er bæði til leikarar og fjølmiðlar.

– Verður innbúgvið fingið í land mikudagin, so fara vit at gera alt fyri at fáa tað upp á pláss áðrenn dystin móti Týsklandi, sigur Ísak Mikladal.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa eina viðmerking frá arbeiðarafeløgunum í verkfalli.

# Fiskiveiðieftirlitið væntar at fáa manning til Brimil

**Vaktarskipið Brimil liggur fyri teym í løtuni, tí Fiskiveiðieftirlitið ikki fær maskinmeistarar til skipið. Elmar Højgaard, stjóri í Fiskiveiðieftirlitinum er tó bjartskygdur um at fáa manning til skipið hóast blokadu frá Maskinmeistarafelagnum**

ARBEIÐSTRÆTA
*Stefan í Skorini*

Teir ellivu maskinmeistararnir umborð á Brimli, sum søgdu seg úr starvi frá 1. juni, eru farnir av skipinum, og skipið liggur nú fyri teym orsakað av manningartroti.

Maskinmeistarafelagið krevur framvegis, at allir verða settir aftur í starv, og so leingi Fiskimálaráðið ikki gongur hesum kravi á møt, blokerar felagið størvini, sum Fiskiveiðieftirlitið lýsir leys. Felagið noktar sostatt at limum sínum at søkja.

Hóast hetta væntar stjórin í Fiskiveiðieftirlitinum, at tey fáa maskinmeistarar til Brimil.

– Vit vænta, at vit fáa maskinmeistarar til Brimil, so at skipið kemur í sigling skjótt, sigur ein bjartskygdur Elmar Højgaard, stjóri í Fiskiveiðieftirlitinum.

### Eingin trupulleiki

– Henda støðan er ikki nøktandi í longdini, men beint nú er tað ikki nakar trupulleiki, at Brimil liggur við bryggju, sigur Elmar Højgaard.

Hann sigur, at hetta er feriutíð, og tí hevði Brimil helst ligið við bryggju kortini.

Elmar Højgaard vil ikki siga nakað um, hvussu nógvar maskinmeistarar Fiskiveiðieftirlitið hevur tøkar til at manna Brimil og Tjaldrið. Nóg nógvir eru tó at manna Tjaldrið, tí tað er í sigling í løtuni.

Ellivu av tólv maskinmeistarum søgdu seg úr starvi, og tríggir nýggir eru settir. Tískil kann roknast við, at Fiskiveiðieftirlitið hevur fýra maskinmeistarar at ráða yvir.

Fiskiveiðieftirlitið fer í hesi vikuni at lýsa eftir maskinmeistarum til skipini bæði.



*Stjórin í Fiskiveiðieftirlitinum væntar at fáa nóg nógvar maskinmeistarar at manna bæði vaktarskipini skjótt. Sum er liggur Brimil fyri teym*



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Sonja Fuglø viðurkenning frá Enjo International



*Aðalumboðið fyri Føroyar, Tórharda Bláhamar, h.m., handar Sonju Fuglø viðurkenning frá Enjo International*
*Mynd: Solby A. Eliasen*

**Norðoyingar eru heimsins fremstu brúkarar av umhvørvisvinarligari reingerð frá ENJO**

Eftir at í skjótt 10 ár at hava umboða Enjo í Norðoyggjum, var Sonja Fuglø í Klaksvík heimsins besta einstaka Enjo umboð í apríl 2003. Har umframt bleiv hon nr. 10 í Evropa allan apríl mánaða 2003. Sonja er dugnalig og ágrýtin, sigur Tóharda Bláhamar, Enjo aðalumboð í Føroyum. Í Føroyum eru tilsamans 10 sølufólk, men pláss er fyri 16. sigur hon. Føroyar selja mest av Enjo vørum í øllum heiminum fyri hvønn íbúgva, londini sum vit kappast við eru Ísland og Australia. Á hendan hátt er Enjo við til at gera Føroyar kendar sum eitt umhvørvisvinarligt land, sigur Tórharda Bláhamar.

# Erling hevur nokk av olju

**VW Lupo bilurin hjá Erling Simonsen í Havn man vera ein av mest umtalaðu bilum í Føroyum í nýggjari tíð. Bilurin koyrir upp á rapsolju. Hóast trot er á brennievni um alt landið, hevur Erling nokk av rapsolju til nakrar mánaðir**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*




*Erling Simonsen við VW Lupo rapsbilinum. Her sýnir hann fjarstýringina, sum hann brúkar, áðrenn hann startar bilin fyrst á morgni*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Nú trot er á dieselolju og bensini, spurdu vit Erling Simonsen í Havn, sum koyrir við rapsolju, hvussu hann klárar seg í hesum døgum. Hann sigur at hann hevur nokk av rapsolju til nakrar mánaðir. Bilurin, ein VW Lupo 3L, bleiv bygdur um til rapsbil í februar í ár. Hann hevur nú koyrt umleið 2.000 km bilinum, ið roynist sera væl. Tað einasta hann skal hugsa um er at hita motorin eini 15 til 20 minuttir, áðrenn hann verður settur í gongd fyrst á morgni. Hetta verður gjørt við eini fjarstýring.

Við tað at bilurin var hálvtannað ára gamal, tá hann bleiv umbygdur til rapsbil, kann Erling nú úttala seg um munin. Hann sigur, at hetta var ein góð íløga. Bilurin trekkjur tað sama og er líka kvikur, sum hann var áðrenn umbyggingina. Hann eigur eisini ein Mitsubishi Pajero jeep, sum hann hevur ætlanir um at byggja um til rapsbil.

### Regin av Steinum 60 ár



Í gjár, týsdagin 2. juni, fylti Regin av Steinum í Kollafirði 60 ár. Hann er sonur Niels Paula av Steinum, kallaður Heygs-Palli, ættaður av Velbastað og í mong ár uppsitari í Kollafirði á garðinum, sum nú hoyrir til Búnaðardepilin í Kollafirði, og Jensiu, f. Clementsen av Sandi. Hann er giftur við Paulinu, f. Joensen, úr Fámjin.

Regin tók læraraprógv á Zahles Seminarium í 1971. Hann var lærari í Keypmannahavn 1971-72 og síðani á Argjum. Hann tók prógv sum skúlabókavørður í 1989. Hann var formaður í Kollafjarðar Ítróttafelag í 3 ár frá 1977 og bygdarráðslimur á Argjum 1993-96.

Hann hevur verið tjóðveldismaður í politikki og var formaður í Norðstreymoyar Tjóðveldisfelag í 1982.

### Poul J. Vitalis 25 ára starvsdag á Føroya Tele



Í gjár, 2. juni, hevði Poul Jakki Vitalis í Havn 25 ára starvsdag sum fjarritari hjá Føroya Tele. Poul Jakki er 51 ára gamal, føddur og uppvaksin í Klaksvík, sonur Sannu, f. Djurhuus (1918-1976), ættað úr Porkeri, og Vitalis E. Vitalis úr Klaksvík. Líðugur við fólkaskúlan fór Poul Jakki í sigling hjá Skipafelagnum Føroyar sum lættmatrósur við Falki. Hann var eisini ein túr í Grønlandi við tí seinasta Tjaldrinum (Astreu) við útróðrarmonnum í 1968. Í 1969 fór hann á fjarritaraskúla í Klaksvík, har hann tók prógv sum fjarritari í 1971. Frá 1971-76 sigldi hann sum fjarritari við frakt- og oljutangaskipum hjá Mærsk. Frá 1976-77 var hann fjarritari við hekkutrolaranum Nónhamri. Eftir tað var hann vikarur við Argja Skúla skúlaárið 1977-78.

2. juni 1978 varð Poul Jakki settur í starv sum fjarritari á Telegrafstøðini hjá "Det Store Nordiske Telegrafselskab" við Tinghúsvegin í Havn. Seinni yvirtók Telefonverkið støðina, sum nú hoyrir undir Føroya Tele. Uppgávurnar hjá fjarritarunum á støðini eru fyrst og fremst at hava radiovakt á Tórshavn Radio. Umframt vanligar samrøður, hava teir ábyrgdina av lurtivaktunum á neyðbylgjunum og radiosamskiftinum, ið hevur við neyð- il og trygd á sjónum at gera.

Poul Jakki er giftur við Elin, f. Frederiksen, sjúkrarøktara, úr Klaksvík. Tey búgva í Havn og eiga tvey børn, Sannu, sum er fødd í 1979, og Ova, sum er føddur í 1983.

### Dagurin

**3. juni. Erasmus,** Deyður í umleið 300. Biskupur í Antiokia. Fleiri ferðir varð lagt eftir honum, og hann varð illa píndur, men komst undan og doyði í friði og náðum. Navnið kemur av grikskum orði, ið merkir *elskar*.